Vágs Kommuna

# Pedagogur/ hjálparfólk til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi at byrja 18. august 2008 í tíðaravmarkað starv.

**Starvið umfatar:**
At arbeiða 30 tímar um vikuna.

Vit ynskja, at tú dugir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum:
- Dámar væl at verða úti
- Ert kreativur
- Hevur gott foreldra og starvsfólkasamstarv.

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sørin Richardt, leiðara tlf. 374036/229482.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skullu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. mai 2008 kl. 12.00. Merk umsóknina “pedagogur/hjálparfólk”.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Vágs Kommuna**
Mentunarnevndin

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.

# Sethús og jørð í Skúvoy

Við hesum verða niðanfyri standandi ognir lýstar til sølu:

**Matr. nr. 115, Skúvoy:** Grundøki stórt 329 m² við ástandandi sethúsum, fjósi og hjalli. Húsini eru bygd uml. 1900. Kjallarin er eitt rúm, í miðhæddini er gangur, køkur, spískamar, stova og baðirúm. Á loftinum eru tvey kømur og útiloft. Sentralhiti er ikki í húsunum. Húsini krevja nógvar ábøtur.

**Matr. nr. 114, Skúvoy:** 6 gyllin og 0,1 skinn uttangarðs í hagapartinum Miðjuni og 9.557 m² innangarðs.

**2/5 av matr. nr. 117, Skúvoy:** Samlaða ognin er 24 gyllin 16 2/3 skinn uttangarðs í hagapartinum Miðjuni og 16.457 m² innangarðs. Av hesum verða 2/5 lýstir til sølu.

**2/15 av matr. nr. 84, Skúvoy:** Samlaða ognin er 3 gyllin uttangarðs í Norðarahaga, heimara parti og 3.155 m² innangarðs. Av hesum verður 1/3 lýstur til sølu.

Nærri upplýsingar um ognirnar fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, telefon 353335 ella t-post frp@jura.fo ella skrivaran Maibritt Johannessen t-post maj@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

Vágs Kommuna

# Avloysari til Dagrøktarskipanina í Vágs kommunu

Dagrøktarskipanin í Vágs kommunu søkir eftir einum avloysara fyri dagrøktara í farloyvi at byrja 1. juni 2008 fram til 31. desember 2008.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur hegni og áhuga at ansa børnum
- Ert álítandi og hevur góð evnir til samstarv
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Ert tolin og vísir umsorgan fyri børnunum
- Neyðugt er við góðum umstøðum at ansa børnum, soleiðis at børnini eru í tryggum karmum, bæði inni og uttandura.

Arbeiðstíðin er frá kl. 7.30 til kl. 17.15 og lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar um starvið fast við at venda sær til Irdi Bjarkhamar, dagrøktarleiðaran tlf. 374095 ella tlf. 224842.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi tann. 5. mai 2008 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:
*Vágs kommunu*
*Vágsvegur 22*
*FO-900 Vágur*
*Viðm. Avloysari til dagrøktina*

# Við Myllutjørn

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 27. mars 2008 samtykti, at útstykkingin eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla fær navnið **við Myllutjørn** og ikki sum áður lýst Myllutjørn.

Tórshavnar kommuna

TRIV SP/F

# Starvsfólk til TRIV

Til verkstað okkara sóknast vit eftir starvsfólki til umvæling av traktorum, sláimaskinum og øðrum landbúnaðarmaskinum.

Tað er sjálvandi ein fyrimunur, um tú ert t.d. landbrúksmekanikari, maskinsmiðjur e.l., men hevur tú fingið tín lærdóm av egnum royndum, so ert tú vælkomin at søkja, tí vit vilja fyrst og fremst hava fólk við røttu evnunum.

Eru spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum ella send okkum nøkur orð um teg sjálvan.

Triv
Heygsvegur 30
P.O. Boks 197
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 69 10
Fax 31 81 19

Ágangur

# Fundur

Fundur verður í VB húsinum leygardagin 19/4 kl 14.00 við heitinum

**VIT ERU ÍMÓTI KYNSLIGARI MISNÝTSLU AV BØRNUM**

Fólk frá KRIS, ágangur.com og løgregluni fara at greiða frá.

Eisini fara 3 offur fyri misnýtslu, at siga frá.

agangur.com



1903 VB · 1892 TB · KRIS